## Landa sildina í Noregi

Í seinastuni hava føroysk skip landað rættiliga nógva sild í Noregi, men hagtøl hjá norsku myndugleikunum vísa, at tey føroysku skipini eru ikki tey einastu, sum sigla til Noregs at landa. Hagtølini vísa, at í 2006 landaðu útlendsk skip 21.200 tons av sild til matna í Noregi, í fjør kom nøgdin upp í 58.300 tons, og higartil í ár hava tey útlendsku skipini landað næstan 78.000 tons av sild til matna í Noregi. Fiskaren skrivar, at føroysk skip hava landað sild í Noregi í fleiri ár, men at nú eru skip úr Danmark, Hetlandi, Skotlandi og Íslandi eisini farin at landa sild har.



# kari arbeiðsmegi



tískil tekur sína tíð.

Crew.fo heldur, at vit í Føroyum mugu taka í egnan barm.

- Vit mugu taka okkum saman og loysa henda trupulleika, sum hevur stungið seg upp við broyttu útlendingalógini. Loysnin er at fáa Landsfólkayvirlitið at geva hesum fólkum eitt permanent p-tal beinanvegin, tí hesi fólk gjalda jú alt, tey skulu heilt frá fyrsta degi, tey eru her. Skuldi tað seinni víst seg, tá Udlændingeservice umsíðir hevur viðgjørt einstøku umsóknirnar, at onkur umsókn ikki verður gingin á møti, kunnu hesi fólk sendast heimaftur. Tað er ikki verri enn tað, halda teir báðir, sum í sínum arbeiði kenna trupulleikan til botns.

### Tvey dømir

Crew. Fo nevnir tvey dømir um, hvussu tað kann gangast útlendingum, sum eru komnir higar at arbeiða – eftir gomlu lógini.

Jacek Belina kom til landið og náddi ikki at fáa ”klistrimerkið” í passið, áðrenn loyvi gekk út. Orsøkin er, at tú vanliga søkir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í eitt ávíst tíðarskeið. Øll tann langa tíðin, sum tað tók at viðgera hetta mál, fór avstað við meginpartinum uppihaldstíðini, sum søkt var fyri. Tískil mátti søkjast av nýggjum. Tá hann so endiliga slapp til landið, var skeiðið runnið.

Søkt varð um longt arbeiðs-og uppihaldsloyvi í juli 2007, eftir at ringt hevði verið bæði til føroyskar og danskar myndugleikar í 11 mánaðir - uttan at nakað sum helst hendi.

- Parolan úr Danmark var, ”jamen tag det roligt, så længe som sagen er under behandling, bliver han ikke smidt ud...” Vit royndu at túta í oyruni á myndugleikunum, bæði her heima og í Danmark um, at hann ikki fekk minstuløn, at hann ikki fekk sjómannaskatt, at hann ikki kundi flyta til kommununa – og at hann ei heldur kundi melda seg til læknaskipanina í kommununi, hann nú býr í.

Karl og Jónas siga, at tá bikarið í mai 2008 fleyt yvir hjá crew.fo, vendu teir sær vegna reiðaran beinleiðis til Birthe Rønn Hornbech, ráðharra.

- Vit greiddu henni frá, at vit vegna hendan hjálparleysa pólverja vóru fullkomiliga hjálparleysir. Vit søgdu við Birthe, at hendan óvirðiliga viðferð av hesum manni mátti halda uppat. Dagin eftur ringdi ein av ovastu fólkunum í ráðharrastovuni og segði, at tey arbeiddu við sakini, og at málið fór at vera loyst skjótt. Annan dagin eftir var loyvið komið á politistøðina í Havn. Tað mest ekstrema var, at umsóknin uppá longt arbeiðs-og uppihaldsloyvi eisini – og at myndugleikin tí av sær sjálvum mátti forleingja tað nakrar mánaðir.

Teir siga, at teimum kunnugt hevur Jacek ongantíð fingið samsýning frá myndugleikunum fyri mistu minstulønina – og tó hevur TAKS bæði goldið honum skatt aftur og sett hann í rættan skattaflokk.

### Annað dømi

Tomasz Kebrowski kom til Føroya í mai í ár, og eins og hjá Jacek gekk loyvið hjá honum út, tá hann

Kom. Ein av orsøkunum er, at hesir persónar hava bíðað so ómetaliga leingi eftir arbeiðs- og uppihaldsloyvi, at arbeiðsgevarin júst fær stundir til at fáa fólkið heim – og fær stundir til at søkja av nýggjum.

- Søkt var av nýggjum í mai í ár. Nú vit eru komin inn í november, er støðan hjá Tomasz soleiðis, at hann verður brandskattaður, hann fær onga minstuløn, hann hevur ongan lækna, hann kann ikki flyta alment til Tórshavnar kommunu – og sum áður er tað ”klistrimerkið” sum manglar. Vit hava vegna reiðaríið óteljandi ferðir ringt til bæði føroyskar myndugleikar og ikki minst til Udlændingeservice.

Karl og Jónas siga, at tað seinasta, teir hoyrdu úr Danmark eftir at hava fingið skrivliga váttan frá Tomasz, var, at ”der bliver arbejdet med sagen...”

- Vit hava eisini óteljandi ferðir ringt bæði til Innlendismálaráðið og Útlendingastovuna, og har verður sagt, at tey bíða eftir boðum úr Danmark, har tey skulu fáa at vita, hvussu tey málini, sum vóru fyri 1. juli 2008, skulu viðgerast. Meðan hetta fer fram, situr Tomasz sum ein annan floks borgari, brandskattaður - og er við til at gjalda fyri veitsluna, men má standa úti í regninum og kúra, siga Karl Christiansen og Jónas Sigmarsson hjá crew.fo


Eitt lítið KT-virki
er blivið 1 ár



Grafikmaster tel 227000

Vit hava loyst uppgávur innan Microsoft SharePoint fyri smáar kundar við 10 starvsfólkum og fyri stórar kundar við 1.6 mió brúkarum á teirra ekstraneti.

Hava eisini verið ráðgevar og undirveitarar í sambandi við verkætlanir á 1.3 mia krónur.

Stutt sagt, so elska vit at loysa uppgávur í SharePoint!

intra

intra@intra.fo
+298 599 123

SKRÁSETTUR MICROSOFT PARTNARI

**Intra** er leiðandi innan Microsoft SharePoint við kundum á privata og almenna økinum, bæði í Føroyum og í Danmark. Vit hava hollar royndir innan Microsoft, .NET, SharePoint og Office 2007.